# Kjak



Óli Jacobsen

## Jan Højgaard sparkar liggjandi mann

Í Sosialinum í dag verður greitt frá, at skrivstovumaður í Fiskimannafelagnum Olaf Johansen er »burturvístur« úr sínum starvi.

Fari at gera fylgjandi viðmerkingar til hetta mál:

Olaf hevur arbeitt í FF í eini 35 ár. Av hesi longu tíð hava vit arbeitt saman í meira enn 30 ár.

Hesa tíðina menti FF seg til at vera eitt tað virknasta fakfelag í landinum, sum skapti framstig hjá fiskimonnum á øllum økjum. Her er nóg mikið at nevna sjómansskattaskipanin, sum higartil hevur givið sjómonnum um ¾ milliard krónur. Arbeitt varð við miðvíst at undirbyggja sjónarmiðini hjá fiskimonnum. Hetta var millum annað gjørt við at menna eina hagtalsskipan fyri fiskimenn, sum nógv hava verið imponeraðir av, eisini í útlandinum. Slíkt krevur dugnalig hjálparfólk. Og tað hevur nógv tað longstu tíðina verið Olaf.

Eg kann bert bera honum, at hann hevur verið eitt álitisfólk, sum samvitskufult hevur gjørt sítt arbeiði og meira til. Kenni einki til, at tað kann setast ein fingur á tað, sum hann hevur avrikað. Hann hevur eisini brent fyri fiskimenn og sínum arbeiði. So hann hevur í hvussu er uppiborið eina virðiliga viðferð frá felagnum.

### Ræðulig mura

Tað, sum Jan Højgaard nú hevur gjørt, er fullkomiliga ólógligt, umframt at tað er skakandi hjartaleyst. Tað stendur greitt í viðtøkum felagsins, at tað er nevndin, sum setir starvsfólk. Tí er tað eisini bara hon, sum kann siga fólk úr starvi.

Men sum ikki eina ferð hevur Jan Højgaard sett nevndina uttan fyri eitt mál, har tað greitt er hon, sum hevur avgerðarrættin.

Burturvísingin av Olafi er eitt álvarsamt rættarbrot. Tað eru heilt greiðar reglur um burturvísing. Tær eru, at viðkomandi skal hava forbrotið seg álvarsliga móti arbeiðsgevaranum, sum t.d. at hava tikið av kassanum.

Hetta mál vísir enn einaferð, at Jan Højgaard er uttan menniskjansligar kenslur. Av eini ella aðrari orsøk skal hann hevna seg inn á Olaf. Og tað er ikki við náði. Olaf skal líða ta eyðmýking at verða snøgt sagt blakaður út í tún úr sínum arbeiðsplássi gjøgnum 35 ár. Jan Højgaard er enntá so fúlur, at hann ætlar, at tað skal vera uttan nakra uppsagnarløn.

Tað er enn meira avdúkandi fyri muruna í Jan Højgaard, at hann veit væl, at Olaf er sjúkur maður. Hann brúkar fleiri tímar annan hvønn dag á Landssjúkrahúsinum til dialysu. Hetta er nóg hart fyri ein og hvønn. So her er bókstavliga talan um at sparka eftir einum liggjandi manni.

Tað sigur nakað nógv um Føroya Fiskimannafelag, at hetta kann Jan gera, tí hann heldur seg hava uppbakking frá nóg nógvum nevndarlimum, uttan mun til, hvørja beistagerð hann fremur.

Samstundis hevur hansara »stílur« uppbakking frá meirilutan av fiskimonnum umframt (parta)politiska uppbakking.




## Landsbókavørðurin farin frá

Mentamálaráðið og Marjun Patursson hava í dag gjørt avtalu um, at hon beinanvegin fer úr tíðaravmarkaða starvi sínum sum landsbókavørður, sum hon hevur røkt síðan september 2008.

Mentamálaráðið vil staðfesta, at avtalan er gjørd í fullari semju millum partarnar, og ráðið fer at takka Marjuni Patursson fyri hennara drúgvu tænastu á Føroya landsbókasavni. Marjun Patursson hevur verið í starvi sum bókavørður á Føroya landsbókasavni síðan 1982. Í tveimum umførum hevur hon verið avloysari fyri 1. bókavørð og í tveimum umførum verið virkandi landsbókavørður. Harumframt var hon leiðari fyri verkætlanina at samskipa føroysku bókasøvnini í ein felags dátugrunn.

Mentamálaráðið hevur sett Armgarð Weihe, fulltrúa á Mentamálaráðnum, sum virkandi landsbókavørð fram til 1. januar.



Hanus Samró
*formaður í HUXA*

## Hugsa longri enn ár 2011, Helena?

*HUXA er í móti uppskotinum um broytingarnar av lestrarstuðulsskipanini*

Tað tykist, sum ungdómurin er lætt offur, tá ið fíggjaruppskot verða løgd fyri tingið. Fyrr í ár gekk tað út yvir stuðulsupphæddina til hægri lesnað, og aftur hósdagin 7. oktober liggur uppskot fyri tingið, hvørs endamál er skerja íløgu í framtíð føroyinga.

### Uppskot

Í fíggjaruppskotinum verður skotið upp, at lesipeningur til heimabúgvandi lækkar frá 2.200 kr. til 1.800 kr. um mánaðan, aldursmarkið til hægri lesandi hækkar til tjúgu ára aldurin, og ferðastuðulin uttanlands lækkar við 1.000 kr. (samstundis sum prísurin av flogferðaseðlum fer upp). Næmingar við arbeiði verða eisini revsaðir fyri hvørjar 1.000 kr., sum inntøkan fer upp um 10.000 kr. Við hesum uppskotinum sparir Landskassin níggju milliónir krónir.

### Undranarsamt

Landsstýriskvinnan við mentamálum, Helena Dam á Neystabø, ið umsitur lestrarpening, mótsigur sær sjálvari, tá ið hon sigur í *Løgtingsmál nr. 25/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul, at: best hugsandi íløgan í framtíðina, bæði fyri hin einstaka og fyri samfelagið alt, er, at so nógv sum møguligt fáa eina holla útbúgving, serliga sum støðan nú er við arbeiðsloysi. Tí eru játtanirnar til útbúgving raðfestar høgt.*

### Nei!

Við hesum samtykki tyngist útbúgvingarbyrðan, tí sjálvt um næmingarnir búgva heima, skal húsaleiga møguliga rindast. Haraftrat eru 1.800 kr. um mánaðin ikki nógv í heimsins dýrasta landi. Helena Dam á Neystabø ger eisini mismun á lesandi, tá ið aldursmarkið hækkar til tjúgu ár. Men sambært uppskotinum er: *torført at meta um, hvar skerpaðu krøvini til lesandi undir 20 ár á miðnámsskúlunum geva í sparingum"*. Er tað ikki ov vágafult at fara í holt við slíkt, tá ið tað er óvist, hvørjar avleiðingarnar verða? Er tað ikki ov vágafult at lækka lesipeningin, tá ið Føroyaland bløðir ungdóm? Nei, um útbúgvingar verða raðfestar í hesum landið, so er hátturin misskiltur, tí eins og við øllum *íløgum*, er tað ein spurningur um tíð. Vit mugu hugsa longri enn ár 2011, tá ið vit hava við útbúgvingar at gera.